# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

Vígdis Sigmundsdóttir, listakvinna:

## Ormurin langi í Mentamálaráðnum

**Mikudagin 6. oktober læt listakvinnan Vígdis Sigmundsdóttir upp eina framsýning í Mentamálaráðnum við pappírsklippum yvir kvæðið »Ormurin langi«. Frímerkjadeildin hjá Postverki Føroya hevur keypt alla framsýningina**



*Listakvinnan Vígdis Sigmundsdóttir hevur ein spennandi og litríka framsýning í Mentamálaráðnum við Hoyvíksvegin í Havn*

LISTAFRAMSÝNING

*Myndir: Jens Kristian Vang*

Listakvinnan Vígdis Sigmundsdóttir hevur ein spennandi og litríka framsýning í Mentamálaráðnum við Hoyvíksvegin í Havn.

Framsýningin við klippmyndunum er yvir kvæðið »Ormurin Langi«. Myndirnar eru bæði vakrar og sera dramatiskar við nógvum spennandi og litríkum detaljum.

Tá farmsýningin læt upp, helt Petur Petersen, aðalstjóri í Mentamálaráðnum røðu. Hann segði m.a., at hann skilti væl at Postverkið hevði keypt alla framsýningina og gjørt av at nýta myndirnar til frímerki. Hetta er ein stórur heiður fyri Vígdis, sum á henda hátt fær myndlist sína út um allan heimin.

Vígdis Sigmundsdóttir ið er útbúgvin sjúkrarøktarfrøðingur og innandura-arkitektur. Hon hevur teknað, málað og klipt alt sítt lív. Hon er dóttir kenda listamálaran Sigmund Petersen.

Seinastu árini hevur Vígdis arbeitt nógv við pappírsklippi. Hon hevur sín egna arbeiðshátt, og myndaevnini eru ofta úr føroysku náttúruni.

Tað var í samband við eina framsýning í Norra, sum hon var boðin við til, at hon fór í kvæðaheimin eftir evnum til klippmyndirnar. Sjálv er hon virkin í fleiri dansifeløgum, og hava føroyski dansurin og kvæðaskaldskapurin verið beinleiðis íblástrarkelda.

Frímerkjadeildin hjá Postverki Føroya hevur keypt alla framsýningina. Ætlanin er at geva út eina frímerkjarøð við klippmyndunum.

Framsýningin í Mentamálaráðnum verður til 1. januar 2005. Opið er mánadag-hósdag frá kl. 8.00-16.00 og fríggjadag frá kl. 8.00-15.00.



*Myndirnar eru bæði vakrar og sera dramatiskar við nógvum spennandi og litríkum detaljum*



*Petur Petersen, aðalstjóri í Mentamálaráðnum helt røðu. Hann segði m.a., at hann skilti væl, at Postverkið hevði keypt alla framsýningina og gjørt av at nýta myndirnar til frímerki*



*Vígdis Sigmundsdóttir og Svanbjørg Manai, frá Frímerkjadeildini hjá Postverki Føroya, aftan fyri tær síggjast Sigrun Petersen og Noomi Jul*



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Harry Jacobsen 65 ár



Í dag, mikudagin 20. oktober fyllir Harry Jacobsen á Toftum 65 ár.

Harry er toftamaður, foreldrini vóru Amalia og Anton í Nýggjagerði á Toftum.

Sum 17 ára gamal fór hann at sigla. Hann sigldi við »Phebe« og »Hans Oliver Højgaard«, seinni »Morgunroðin«, í 20 ár, og við rækjutrolaranum »Kristinu Logos« í 7 ár.

Seinastu 20 árini hevur hann siglt sum stýrimaður við skipum hjá Skipafelagnum Føroyar, mest við farmaskipinum »Lómi«.

Harry tók skiparaprógv í 1965, og 1969 giftist hann við Solveig, f. Danielsen, ættað úr Vági. Tey eiga 5 børn og sjey ommu- og abbabørn.

Føðingardagurin verður hildin í heiminum á Toftum fríggjadagin 22. oktober.

## Andrias Petersen til New York



Andrias Petersen í Gøtu, løgtingslimur Javnaðarfloksins í Eysturoyar valdømi, hevur fingið farloyvi frá løgtinginum frá 17. oktober til 13. november 2004 í samband við at hann skal umboða Føroya Løgting á ST-aðalfundinum í New York.

Andrias var landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum frá 1994-96.

## Dan Reinert Petersen tikið sæti í Løgtingi



Dan Reinert Petersen í Fuglafirði hevur tikið sæti á løgtingi fyri Andrias Petersen, ið er í farloyvi.

Dan er næsti maður á lista Javnaðarfloksins í Eysturoyar valdømi.

Hann var valdur løgtingslimur frá 1998-2002.

## 251 bilar standa til at missa nummarspjøldrini




### Tíðindaskriv

Bileftirlitið hevur í dag latið politistøðunum kring landið 251 mál um vegskattaeftirstøður, til at taka nummarspjøldrini av akførum, sum enn ikki hava goldið vegskatt fyri seinna hálvár 2004.

Kann bileigarin ikki vísa fram kvittan fyri goldna vegskattaeftirstøðu, verða nummarspjøldrini tikin av bilinum.

## Ein góður vinur farin



Jákup Dahl-Olsen er ikki longur okkara millum. Hann vil eg fegin minnast við nøkrum orðum.

Tað var í 1937 - eg var komin úr Svínoy til Vestmannar at ferðast -, at pápasystir ein kavadag legði mær til at fara út millum børnini, sum skreiddu har uttanfyri. Jú, eg slapp at sita á kelku saman við sýslumansdótrini Marjun, og tá spælið helt fram innadura, kom eisini lítlibeiggin Jákup uppí. Hann var tá júst vorðin fýra ára gamal, og eg hevði ikki fylt seks.

Tað var tó ikki so nógv, vit sóust í barnaárum; men 10 ár seinni, tá vit í 1. G høvdu tikið stig til kórsang úti á VBV, kom Jákup, sum tá gekk í 1. P, við í kórið. Hann hevði tá enn ikki fingið mansrødd og sang tí við millum genturnar í alt-stemmuni.

Vit hittust aftur við ymisk unglinga- og studentahøvi, og altíð var tað tað tónleikaliga, sum dró saman. Veruligt vinarlag millum okkum báðar tók seg upp við byrjan av 60-árunum, tá vit høvdu fingið í lag aftur føroyskan kórsang í Keypmannahavn. Við sínari sjarmu og sínum tónlistarliga eldhuga bleiv Jákup eitt savnandi álit í hesum felagslívi.

Jákup og Randi settu um hetta mundið búgv úti í Strandgade. Sjálvur búði eg ikki so langt haðani, og hugnaligt er tað at minnast eg aftur á, hvussu eg altíð var vælkomin á gátt hjá teimum.

Tá ið Jákup við húski var fluttur heimaftur til Føroya at búgva í 1970, var tað so sjálvandi, at hann kom við inn í tað kórarbeiði, sum við byrjandi samstarvi við útvarpið tá hevði tikið seg upp í Havn. Tað var so beinanvegin, at Jákup eisini her gjørdist ein kveikjandi miðdepil.

Jákup var vinsælur maður, altíð við tí góða orðinum. Hugbráður, sum hann eisini var, kundi hann hvessa frá sær - tó ongantíð særandi, tí altíð ráddi góðlyndið aftanfyri. Kenslaríkur setti Jákup meira enn nakar dám á tær stóru framførsluløturnar, tá eygu hansara lýstu av eldhuga, og teir, sum undir liðini stóðu, mangt birtandi albogaskumpið fingu:" Var hatta ikki gott? " Hoyri fyri mær hansara darrandi rødd, tá hon, eitt nú í einum ljómandi Brahms-satsi, í listarligum ovurhuga tók seg upp í hæddirnar, har honum, hóast bassur, í slíkum løtum hóvaði best. Á vertskapligum samkomum aftaná var mangan ovfarakæti á honum, har hvør tægr í hansara kroppi spældi í musikalskari og sosialari vælveru.

Vit báðir Jákup slitu ikki gáttirnar hvør hjá øðrum; men vinsemið var eyðsýnt við eitthvørt samveruhøvi. Ikki minst tá vit vóru á floti saman. Mong hugnaløtan var eitt nú úti fyri Kirkjubønesi. Væl tók í hjá honum, og hvørja ferð mundi hann hava munin; men var veðurløtan føgur, vóru altíð ráð til at draga nakað upp frá botni, lata bátin bara reka av leið og at seta okkum saman til eitt hugnaligt prát við einum góðum bita og onkrum leskiligum afturvið. Altíð hevði hann okkurt forkunnugt við sær í matarskríninum, sum var til okkum báðar.

Ikki er tað ár, síðan vit báðir seinast løgdu leiðina suður um Glyvursnes. Ikki kundi tað óra meg, at hetta skuldi verða okkara seinasta ferð á floti saman. Á konsert hjá Havnarkórið í februar kom Jákup sum áhoyrari eftir seinasta sang upp millum sangararnar, og eg skilti, at hann eins og vildi gera vart við nakað. Eftir at tað seinni var vorðið greitt, hvønn veg tað bar hjá okkara góða vini, var tað okkum í kórinum ein sorgblíð gleði, at hann framhaldandi søkti samband við okkum.

Í sorg og við samkenslu drýpa vit høvur, nú Jákup Dahl-Olsen ikki er meira, men eisini við takksemi fyri rík minnir, sum verða varandi.

**Ólavur**

Okkara kæri maður, pápi, verpápi og abbi

**Andrew Joensen**
**Kollafjørður**

andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin 17. oktober, 75 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Kollafjarðar kirkju mikudagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*

**Halltóra**

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Turid Maria Hansen**
**Tórshavn**

andaðist á Lágargarði leygardagin 16. oktober, 97 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni hósdagin 21. oktober kl. 13.00.

**Elsa, Ásbjørn og Páll**

### Dagurin

**20. oktober. Felicianus,** deyður umleið ár 250. Foreldur hansara vóru kristin fólk í Forum Flamini í Italiu. Ungur kom hann til Róm og gjørdist erkadiakonur hjá pávanum. Pávin Viktor setti hann sum biskup í heimbygdini. Keisarin Decius læt hann taka av døgum.

Hans Andrias Djurhuus varð føddur hendan dagin í 1883, og Mikkjal á Ryggi doyði hendan dagin í 1956.